LM-104/2020

fylgiskjal 5

Tórshavn tann 26-01-2021

Viðmerkingar frá Fuglakanningarstøðini á Havstovuni til:

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

Í § 1, stk. 3 stendur "um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av grágásini".
Hvussu skal hetta vísast? Við kanningum av t.d. fíggjarligum missið?

Í § 1, stk. 5 stendur "Tann, sum hevur fingið loyvi at skjóta grágás eftir stk. 3, kann lata einum øðrum persóni sítt loyvi at skjóta grágás á tí øki, sum loyvið fevnir um".
Tað burdi verði krav, at tey ið skjóta gás, kenna mun á grágás og øðrum sløgum av gás. Sama er galdandi fyri alla fuglaveiðu.

Í § 1, stk. 6 stendur at "Landsstýrismaðurin stílar fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás verða framdar".
Átti at verði, at "Landsstýrismaðurin **skal stíla fyri**, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás verða framdar, **áðrenn nakað loyvi verður givið at skjóta gás.**

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1.

1.1.1. Síðst í fyrstu paragraf: "Sum grundgeving fyri lógaruppskotinum varð víst á, at grágásin gjørdi seg inn á velt øki til skaða fyri grasvøksturin og elvdi til stóran miss fyri eigarar og leigarar". Um loyvi skal gevast at skjóta gás, orsaka av einhvørjum missi, eigur minsta krav verða at vísast kann á hvussu stórur missurin er. Hvussu stórur var missurin? Hvussu var tað kannað?

1.1.3. "Heimildin at skjóta grágás fór úr gildi 31. mai 2020. Eftir hetta varð víst á, at grágásin, eins og frammanundan, ger seg inn á grasvøkstur, og at hetta hevur við sær fíggjarligan miss fyri tey, sum brúka lendið til landbúnað."
Hvussu stóran fíggjarligan miss er talan um?

Skal loyvi vera at skjóta eitt óavmarkað tal av grágás, um so er at ein fíggjarligur missur stendst av henni? Óansæð hvussu stóran miss talan er um? Við øðrum orðum, kann ein bóndi ið metir seg hava ein fíggjarliga miss á 500 krónur, skjóta so nógva grágás hann hevur hug til, so leingi hon gongur á veltum lendi?

1.1.4. "Lógarbroytingin loyvir, at skotið verður eftir grágás..."
Hetta kann verða ein trupuleiki orsaka av djóraverndarlógini. Her burdi verði ein áseting av hvørjum skjótast skal við, t.d. ikki minni høgl enn støddd 3, eftir sum støddd 5 helst ikki drepur gásina, uttan so ein er rættiliga nær. Tað átti ikki at verði loyvt at skoti eftir gásini, uttan so at tað er fyri at drepa. Annars skal skjótast fyri at styggja. Ikki burdi verði loyvt at skjóta við luft byrsu. Tað er møguligt at keypa ógvuliga kraftigar luftbyrsur, men talan er um eitt lítið høgl, og tí má fuglurin rakast í antin heilan ella hjarta fyri at drepa umgangandi. Alt annað førir óneyðuga djórapínslu við sær.

1.1.5. "Eftir at heimildin at skjóta grágás fór úr gildi 31. mai 2020 er komið fram, at veruligar kanningar og teljingar av grágásastovninum ikki eru gjørdar, síðani lógin varð longd í 2017."
Hetta er ikki rætt. Teljingar og kanningar vóru gjørdar í 2018 og 2019, og frágreiðing send Búnaðarstovuni. Kanningarnar endaðu í 2019, tí eingin fígging var til staðar longur.

"Búnaðarstovan hevur samlað inn talið av skotnum gæs árini 2014-2019: 47 gæs í 2014, 266 gæs í 2015, 217 gæs í 2016, 24 gæs í 2017, 36 gæs í 2018 og 39 gæs í 2019."
Miðal talið av grágás ið var skotin í 2015-2016 var sostatt 241,5 gæs, ímeðan miðal fyri 2017, 2018 og 2019 var 33 gæs. Man má ganga útfrá at talið ið var skoti, er umboðandi fyri stovnstøddina, og harvið støddina á trupuleikanum. Eftir hesum tølum at meta, var stovnurin í 2017-2019 sostatt bert 14% av tí hann var í 2015-2016, og er tí ikki neyðugt við loyvi at skjóta grágás, tí trupuleikin er loystur.

1.1.8. "Grágásastovnurin er ikki taldur, men Búnaðarstovan metir kortini, at loyvt kann verða at skjóta grágás, ið ger skaða á lendið."
Hetta er í ansøgn við 1.1.7. "...at skjóta grágás, er ikki í sjálvum sær í stríð við bindingarnar í omanfyri nevndu sáttmálum og avtalum, men tað er treytað av, at hetta er burðardygt." Eingin veiða kann verða burðardygg fyrr enn neyðugar kanningar eru gjørdar av stovnsstødd og hvussu nógv kemur undan, soleiðis at veiðitrýsti kann tillagast eftir hesum.

Kapitul 2.

2.4. ... "Velt lendið kann vera fyri dálking, um patrónir og høgl ikki verða tikin upp."
Lendi verður heilt víst dálka og hetta er galdandi fyri alt lendi, ikki bert velt lendi. Burdi staði: "Lendi verður dálka, um patrónir og høgl ikki verða tikin upp".

"Búnaðarstovan fylgir við, hvussu nógv grágás verður skotin, og neyðug stig verða tikin, um vandi er fyri stovninum."
Sambært veiðitølunum hevur stovnurin verði fyri ómetaliga ógvusligari minking seinastu árini, og er tí neyðugt við hesum sonevndu neyðugu stigunum, alt fyri eitt.

2.5. "Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum."
Vita ikki hvussu grágásin er spjædd yvir landi, og harvið hvørja ávirkan hon hevur á ymiskt lendi.

2.14. "Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at skipa fyri kanningum og vísindaligum teljingum av grágásastovninum."
Lógaruppskotið skuldi álagt landsstýrismanninum at skipa fyri vísundaligum teljingum og kanningum av grágásastovninum.

Kapitul 3.

Til § 1, nr. 3. Ásett verður, at tann, sum eigur ella leigar velt lendið, kann søkja um loyvi at skjóta grágás, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av grágásini. Tað má verða okkurt minstakrav til hetta at vísa á at grundaðir trupulleikar standast av grágásini.

"Millum treytirnar, sum kunnu leggjast við loyvinum, er avmarking í tí tíðarskeiði,.."
Burdi verði broytt til: "Millum treytirnar ið fylgja við loyvinum, er avmarking í tí tíðarskeiði,..."

"Loyvið kann eisini vera treytað av, at tann, sum hevur loyvi at skjóta grágás, skal boða frá, hvussu nógv grágás er skotin, og at fuglurin skal latast myndugleikunum til kanningar."
Burdi verði broytt til: "Loyvið **er** treytað av, at tann, sum hevur loyvi at skjóta grágás, skal boða frá, hvussu nógv grágás er skotin, og at fuglurin skal latast myndugleikunum til kanningar.

Til § 2 Áseting um gildiskomu. Mælt verður til at login ikki kemur í gildi, fyrr enn fígging til neyðugu kanningar og teljingar er fingin til vega.

Vegna Havstovuna

Jóhannis Danielsen